UTTAN ÚR HEIMI

## Nýtt svenskt flogfar

Svenska stjórnin játtaði í gjár 750 milliónir svenskar krónur til at menna eitt nýtt hernaðarflogfar. Talan er um eitt ómannað flogfatr, sum verður ført fyri at bumba mál á jørðini.

Leni Björklund, verjumálaráðharri, viðgekk mikudagin, at sum er hevur svenska vrjan ikki brúk fyri einum nýggjum flogfari, men hon legði kortini dent á, at tað er umráðandi, at svenski flogídnaðurin fær støðugar avbjóðingar, so vitanin á økinum kann haldast við líka og mennast. Tað er flogverksmiðjan Saab, sum skal gera nýggja flogfarið saman við fronsku verksmiðjuni Dasault.

Enn er ikki greitt, hvussu nógv tey nýggju flogførini fara at kosta, men tey verða í hvussu er bíligari enn tey kendu svensku jagaraflogførini av slagnum Gripen. Tey kosta umleið 500 svenskar milliónir, skrivar tíðindastovan TT. Fleiri svenskir politikarar eru ímóti at brúka pengar til eitt nýtt flogfar, sum sviar ikki hava brúk fyri.

## Nei til vápnahvíld

Aftan á flóðalduna í Suðurasia annan jóladag í fjør høvdu fólk vónir um, at tað bar til at fáa frið í lag ímillum herin og uppreistrarmenninar í indonesiska landspartinum Aceh, men nú eru vónirnar smáar.

Ovastin fyri indonesiska stjórnarherinum, generalurin Endriartono Sutarto, segði fyrradagin, at hermenn hansara fara at halda fram við bardaganum ímóti uppreistrarmonnunum í Aceh. Uppreistrarmenninir krevja, at Aceh skal fáa sjálvstýri, men sambært herovastanum er tað eitt ófrávíkiligt krav, at teir leggja vápnini, áðrenn talan kann verða um samráðingar um sjálvsstýri.

Flóðaldan annan jóladag kravdi umleið 165.000 mannalív í Aceh-landspartinum. Uppreistrarmenninir og stjórnin játtaðu at binda frið eftan á vanlukkuna, men longu í januar byrjaðu bardagarnir aftur.

Fyrrverandi finski forsetin, Martti Ahtisaari, beyð sær til at royna semju, og hann hevur boðað pørtunum til fundar aftur tann 12. juli, skrivar AP.

## Keypa skógvar úr Kina

Vit hava leingi hoyrt, hvussu klædnaídnaðurin í Evropa kærir seg um ta hørðu kappingina úr Kina, og nú rópar eisini skóídnaðurin varskó.

Nýggj hagtøl hjá ES vísa, at fýra teir fyrstu mánaðarnar í ár innfluttu ES-londini sjey ferðir fleiri skógvar úr Kina enn somu mánaðir í fjør, og myndin er á leið tann sama í USA. Skómakarar í Italia, Spania og Portugal hava sambært Wall Street Journal lagt stórt trýst á ES-nevndina fyri at fáa hana at avmarka tann stóra innflutningin úr Kina, og hesum taka skómakarar í Fraklandi, Grikkalandi og Pólandi undir við.

Tann stóri klædnainnflutningurin úr Kina hevur kostað fleiri túsun arbeiðspláss í ES-londunum, og skómakaarnir stúra fyri, at tað sama fer at henda í skóídnaðinum, skrivar Aftenposten.

## Prestur fekk sekkin

Ein prestur í svenska býnum Kil hevur fingið sekkin, tí hann hevði verið inni á einari pornografiskari heimasíðu í arbeiðstíðini.

Svensk bløð skriva, at maðurin bleiv avdúkaður fyri einum ári síðani, men kirkjuráðið samdist um at geva honum ein møguleika afturat. Síðani hevur presturin eftir øllum at døma skikkað sær væl, men nú hevur kirkjuráðið kortini gjørt av at siga hann úr starvi. Í uppsagnarbrævinum stendur stutt, at hvørki kirkjuráðið ella kirkjufólkið hevur álit á honum longur.

Tað er kortini ikki tann einasta orsøkin til uppsøgnina. Sambært bløðunum vil kirkjuráðið vera við, at presturin hevur ikki røkt sítt starv nóg væl, og harafturat hevur tað verið ein trupulleiki, at hann heldur lítið um kvinnur sum prestar, skriva bløðini.



*Condoleezza Rice kom í harðan andróður á ársfundinum hjá teimum amerikonsku londunum*
*Mynd: Reuters*

# Amerikanskt uppskot um demokrati-eftirlit møtir mótstøðu

**Amerikanska stjórnin heldur, at USA og onnur lond skulu hava rætt til at gera innrás í latínamerikonsk lond fyri at tryggja demokratisk viðurskifti. Men hini londini siga nei**

LATÍNAMERIKA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Á ársfundinum hjá londunum í Norður- og Suðuramerika, sum er í Florida í hesum døgum, hevur USA lagt fram eitt uppskot, sum ikki er fallið í góða jørð hjá hinum 33 londunum.

– Vit eiga at vera á varðhaldi og forða ódemokratiskum stýrum. Tí eigur felagsskapurin at hava heimild til at leggja seg út í viðurskiftini fyri at tryggja demokratiið, segði amerikanski uttanríkisráðharrin, Condolezza Rice, á fundinum fyrradagin.

Men uppskot hennara fekk kaldliga móttøku. Tey stóru londini, Brasil, Meksiko, Argentina og Kili, boðaðu alt fyri eitt frá, at tey tóku ikki undir við amerikanska uppskotinum. Brasilski uttanríkisráðharrin, Celso Amorim, gjørdi vart við, at tað ber ikki til at noyða eitt land at skipa seg eftir demokratiskum reglum. Tann besti hátturin at tryggja demokrati í Latínamerika er at berja fátækradømið niður, segði hann.

Eygleiðarar á fundinum í Florida vóru ikki í iva um, at orðini hjá Condoleezza Rice vóru serliga ætlað forsetanum í Venesuela, Hugo Chavez. Og hon fekk eisini svar frá venesuelska uttanríkisráðharranum.

– Vit vita, at "Uncle Sam" vil hava eftirlit við demokratiinum, men felagsskapur okkara eigur at styrkja demokratiið heldur enn at leggja seg út í innanhýsis viðurskifti í teimum einstøku londunum, segði Alf Rodriguez.

Amerikanska uppskotið kemur, júst sum alt fleiri lond í Latínamerika hava fingið sosialistiskar og sosialdemokratiskar leiðslur. Men sambært Condoleezza Rice er tað eingin trupulleiki fyri amerikonsku stjórnina.

– Hyggið bara eftir Brasil og Lula, forseta. Eg eri hugtikin av tí, sum hann hevur fingið burturúr, og vit hava eisini góð viðurskifti við Brasil, segði hon við tíðindafólk.

# Dømdu skeivan reiðara

**Í 1992 fekk Henrik Johansen seks mánaða fongsul orsakað av vantandi trygd umborð á ferjuni "Scandinavian Star". Men hann hevði ikki ábyrgdina**

SCANDINAVIAN STAR
*Árni Joensen.*
*fartekst@mail.dk*

Um náttina tann 7. apríl í 1990 kom eldur í ferjuna "Scandinavian Star", sum sigldi ímillum Oslo og Frederikshavn. Vanlukkan kravdi 159 mannalív. Tvey ár seinni bleiv danin Henrik Johansen dømdur seks mánaða fongsul, tí rætturin kom til ta niðurstøðu, at trygdin umborð var ikki í lagi, og tað hevði reiðarin ábyrgdina av.

Men nú hevur býarrætturin í Oslo gjørt av, at tað var ikki Henrik Johansen, sum hevði ábyrgdina av "Scandinavian Star", men heldur danski útgerðarmaðurin Niels-Erik Lund.

Avvarðandi hjá teimum, sum doyðu í eldsbrunanum, kravdu í fjør, at málið skuldi takast uppaftur, tí eftir teirra tykki var tann veruligi ábyrgdarpersónurin sloppin undan revsing. Danski ríkisadvokaturin sýtti fyri at ganga kravinum á møti, men nú hava tey avvarðandi gjørt av at endurtaka áheitanina við støði í dóminum hjá býarrættinum í Oslo. Tey hava tí sent Lene Espersen, løgmálaráðharra áheitan um, at málið verður tikið uppaftur.

Tað vakti ans, at býarrætturin í Oslo av sínum eintingum gjørdi av at viðgera spurningin um eigaraviðurskiftini eina ferð afturat, og júst tí halda tey avvarðandi, at úrskurðurin hjá rættinum er sera týdningarmikil.

Enn hevur danski løgmálaráðharrin ikki tikið støðu til, um málið skal takast uppaftur.